# Fólkið hevur talað

**Tað halda møðgurnar báðar, Katrin og Inga Dahl, nú listi 2 vann kirkjuráðsvalið í Havn í gjár við risameiriluta. Inga gjørdist triðvald á listanum við 102 persónligum atkvøðum. Tær báðar halda, at fólkið nú greitt hevur sagt, at kvinnuligir prestar og fráskildir prestar eru vælkomnir í kirkjuna.**

KIRKJURÁÐSVAL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tær báðar, Inga og Katrin Dahl, halda, at úrslitið á kirkjuráðsvalinum í Havn í gjár bert kann tulkast sum greið tala frá fólkinum, ið heldur, at pláss skal verða fyri bæði kvinnum og fráskildum í kirkjuni.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað var ikki hissini valsigur, ið listi 2, sum av fleiri varð skýrdur tann meira frílyntii listin, fekk á kirkjuráðsvalinum í Tórshavnar Eystaru Sókn í gjár. Av teimum 1074 atkvøðunum fullu tær 890 til lista 2, og tað svarar til 82,7 prosent.

### Klárur boðskapur alt at siga

At talan gjørdist um ein somikið greiðan sigur, kom óvart á tær báðar møðgurnar. Inga var sum áðurnevnt eitt av valevnunum, meðan Katrin var stillari og annars hevur verið virkin innan kirkjuarbeiði í drúgva tíð.

- Vit hava allatíðina havt ein heilt kláran boðskap. Vit hava meldað greitt út, at vit ganga inn fyri javnstøðu í kirkjuni, og at tað ongan týdning hevur, um prestur er fráskildur. Somuleiðis hava vit lagt dent á, at vit vilja hava prestar, sum kunnu samstarva við allar aðrar prestar. Hesin klári boðskapur hevur havt alt at siga, halda tær báðar.

Við hesum verður ivaleyst sipað til umstrídda hjálparprestin, Jóanis Fonsdal, sum virkaði í Dómkirkjuni farna valskeið. Hann segði greitt, at hann ikki tók undir við kvinnuligum prestum og fráskildum prestum.

Tað er einki dulsmál, at á lista 1 vóru valevni, sum tóku undir við sjónarmiðjunum hjá fyrrverandi hjálparprestinum. At tann listin bert fekk tveir av fjúrtan limum í nýggja kirkjuráðnum, síggja tær báðar sum eitt greitt tekin um, at fólkið tekur undir við sjónarmiðunum um, at kvinnuligir og fráskilidir prestar eru vælkomnir í kirkjuni.

- Valúrslitið hevur sligið tað rimmarfast, at soleiðis vil fólkið hava tað í kirkjuni, siga Katrin og Inga Dahl.

### Umrøðan í miðlunum stóran týdning

Spurdar hvussu tað ber til, at áhugin fyri kirkjuráðsvalinum hevur verið so mikið stórur, siga tær báðar, at tað eru fleiri orsøkir til tess.

- Eitt er, at fjølmiðlarnir hava gjørt nokk so fitt burturúr, og at viðgerðin í miðlunum hevur verið siðilig. Hetta eiga fjølmiðlarnir rós fyri, sigur Katrin Dahl.

- Tað hevur eisini havt týdning, at tað eru so lang tíð síðani seinasta val, og tí hava fólk nýtt høvi hesaferð at siga sína meining, heldur Inga Dahl.

Í nýggja kirkjuráðið eru nú fitt av yngri kreftum, og á valinum í gjár sást eisini týðiliga, at áhugin millum ung er vaksandi. Hetta fegnast Inga og Katrin Dahl um, og tær halda, at hetta merkir, at áhugin fyri kirkjuni sum heild er vaksandi.

Av teimum 13 kirjuráðslimunum í gamla kirkjuráðnum eru bert fýra teirra afturvald. Spurdar um stóra útskiftingin fer at hava við sær nakrar broytingar í kirkjuni, sigur Inga Dahl.

- Tað er ilt at siga, um vit fara at fáa eina meiri opna kirkju ella hvat. Sjálvandi skal kirkjan verða opin fyri ymiskum tiltøkum, men nú skal ráðið fyrst savnast og skipa seg. Síðani verður stungið út í kortið, hvat vit ætla, sigur hon.

### Inga var ovfarin

Sum áðurnevt gjørdist Inga Dahl triðvald í kirkjuráðið við 102 persónligum atkvøðum. Hon sigur, at hon var ovfarin av úrslitinum.

- Tað eri eg ótrúliga errin av, og eg havi eisini merkt sjálv, at áhugin fyri valinum hevur verið stórur. Tað eru nógv fólk, sum hava tosað við meg um valið, og nú í morgun, dagin eftir valið, havi eg fingið nógva respons á arbeiðsplássinum, sigur Inga Dahl.

Hon dugir ikki at siga, nær nývalda kirkjuráðið savnast at skipa seg, tí tað er tann fyrstvaldi, ið kallar ráðið saman.

Fyrstvaldur er Jákup Símun Simonsen, og tað er eisini rættuliga áhugavert. Seinast kirkjuráðsval var í sóknini í 1985, var fyrstvaldi kirkjuráðslimurin Axel Simonsen, pápi Jákup Símun.

## Bíðirøðin var long

**Áhugin fyri at sleppa at velja á kirkjuráðsvalinum í Havn í gjár var so mikið stórur, at bíðirøðin var nærum 100 metrar long uttan fyri valstaðið í Meinigheitshúsinum. Valluttøkan var nærum 17 prosent.**

KIRKJURÁÐSVAL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var sjáldsama stórur áhugi fyri at sleppa at greiða atkvøðu á kirkjuráðsvalinum í Tórshavnar Eystaru Sókn í gjár. 20 ár eru síðani, at borgarar í hesum partinum av høvuðsstaðnum sluppu at velja til kirkjuráðið, og tað hevur kanska gjørt sítt til, at áhugin hesaferð var so mikið stórur.

### Bæði ung og gomul

Jensa Heinesen, forkvinna í valnevndini, segði, tá ið liðugt var at telja atkvøðurnar um tíggjutíðina í gjárkvøldið, at 1074 fólk høvdu greitt atkvøðu. Hon fegnaðist um góðu undirtøkuna til valið, og seliga hugaligt helt hon tað verða, at tað vóru fólk í øllum aldri, ið høvdu víst valinum áhuga.

Valluttøkan kundi eisini verið væl hægri, tí sum skilst vóru tað fleiri veljarar, ið vendu við aftur, tá ið tey sóu longu bíðirøðina.

**Nýggja kirjuráðið:**

Jákup Símun Simonsen
Vagnur Michelsen
Inga Dahl
Helgi í Brekkunum
Bente Kjær
Ása M. Justinussen
Petur Even Djurhuus
Anna Dahl Olsen
Sólrun Michelsen
Andrias Sjóvará
Randi Petersen
Hans Debes
Kartni Olsen
Per Jacobsen

**Atkvøðubýtið á kirkjuráðsvalinum í Havn:**

Listi 1:

Listin: 4
Randi Petersen: 33
Magnus B. Jørgensen: 4
Ove Láberg: 7
Heðin Mikkelsen: 16
Egon Hansen: 16
Elsa Fonsdal: 6
Christian M. Christiansen: 3
Katrin Johannesen: 4
Steingrím Vang: 8
Atli Klein Olsen: 1
Kjartan E. Dalsgaard: 4
Michael Thomsen: 6
Kristin Magnussen: 4
Turid Joensen: 2
Eyðbjørg Fossadal: 9
Per Jacobsen: 26
Osvald Joensen: 9
Sólrun Poulsen: 10
Birgit T. Olsen: 6
Michaela Sørensen: 5

Tilsamans: 184 atkvøður

Listi 2:

Listin: 24
Jákup Símun Simonsen: 109
Petur Even Djurhuus: 48
Helgi í Brekkunum: 75
Inga Dahl: 102
Anna Dahl Olsen: 47
Hans Debes: 26
Jacoba Funding: 16
Per Hansen: 14
Annika Højgaard: 16
Johannes Eli Iversen: 16
Elinborg Johannesen: 22
Ása M. Justinussen: 56
Ulla undir Kletti: 9
Sólrun Michelsen: 44
Vagnur Michelsen: 103
Kaj P. Mortensen: 22
Kartni Olsen: 26
Malan Rasmussen: 15
Andrias Sjóvará: 43
Bente Kjær: 57

Tilsamans: 890 atkvøður